# Almannamálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 8. nov. 2022 |
| Mál nr.: | 22/08665 |
| Málsviðgjørt: | Heðin D Poulsen |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt**
(Pengarnir fylgja barninum)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 30. apríl 2018, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Aftan á § 6 a, men áðrenn yvirskriftina yvir § 7 verður sett inn:

"Pengarnar fylgja barninum

**§ 6 b**. Kommunan kann veita foreldrum, við børnum upp til barnagarðsaldur eina veiting, um børnini ikki eru á dagstovni ella í dagrøktini sambært § 3.

*Stk. 2.* Treytir fyri at fáa veitingina er, at:

1) Umsøkjari ikki fyri sama tíðarskeið móttekur arbeiðsloysisstuðul sambært løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, útgjald sambært løgtingslóg um barsilsskipan, veiting sambært løgtingslóg um almannapensjónir, uppihaldsveiting sambært løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, lestrarstuðul sambært løgtingslóg um lestrarstuðul ella uppihaldsveiting ella lønaríkoyti sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk.

2) Umsøkjari, ikki í størri mun átekur sær annað arbeiði.

3) Umsøkjari og barn búgva á sama bústaði.

*Stk. 3.* Bæði foreldrini kunnu ikki fáa veitingina samstundis fyri sama barn.

*Stk. 4.* Kommunan ásetir upphæddina á veitingini, sum í mesta lagi kann vera 70% av miðal rakstrarútreiðslunum hjá kommununi av at reka eina vøggustovu í kommununi.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Uppskotið hevur sín uppruna í samgonguskjalinum frá 2019, millum Fólkaflokkin, Sambandsflokkin og Miðflokkin, har ásett er, at tað m.a. verður heimilað kommununum at rinda part av kostnaðinum fyri stovnspláss til foreldur, um tey velja at ansa egnum børnum heima. Hetta verður gjørt út frá meginregluni um, at pengarnir skulu fylgja barninum.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Hóast innihaldið í uppskotinum við at geva kommununum heimild at rinda part av kostnaðinum fyri stovnspláss til foreldur, er ein nýggj skipan, so er í dag einki krav um, at børn skulu ansast á dagstovnum. Foreldur kunnu frítt velja at ansa egnum børnum fram til skúlaaldur og ikki lata tey fara á stovn.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er, at geva kommununum heimild, innanfyri ásettar karmar, at bjóða foreldrum eina veiting, um tey velja, at børnini ikki skulu í vøggustovu, men heldur vera heima saman við foreldrunum til tey fara í barnagarð.

Sum høvuðsregla, er ætlanin við uppskotinum tann, at foreldrini skulu vera saman við og ansa barninum. Tað, at foreldur skulu vera um og ansa egnum børnum, merkir ikki, at tað er ein treyt, at tey skulu vera heima við hús alt tíðarskeiðið. Tað er eingin áseting, sum forðar foreldrum í at ansa børnunum uttan fyri heimi og samstundis uppfylla treytirnar fyri at fáa veitingina.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Innanfyri tær avmarkingar, sum ásettar í uppskotinum, kemur uppskotið at geva kommunum heimild, at geva foreldrum eina veiting, um tey velja at vera heima hjá børnunum til tey fara í barnagarð.

Hetta er ein sjálvboðin skipan fyri kommunurnar og avgerð hvør kommuna sær, um hon ynskir at bjóða sínum borgarum møguleikan. Tað kunnu vera fleiri orsakir til, at kommunur ikki ynskja brúka heimildina og seta skipanina í gildið. Tað kann eitt nú vera, tí kommunan metir tað vera fíggjarliga ella umsitingarliga ov tungt. Harafturímóti kann hugsast, at summar kommunur fara síggja fyrimunir við skipanini, tá skipanini gevur kommununi størri frælsi at skipa seg.

Kommunurnar áseta eisini upphæddina á veitingini, sum tó í mesta lagi kann vera 70% av ansingarkostnaðinum hjá tí einstøku kommununi. Um foreldur velja hesa skipan, sparir kommunan útreiðslur av ansing. Tí tekur veitingin útgangsstøði í kostnaðinum, sum er av at reka kommunala ansing. Fíggjarligi fyrimunurin fyri foreldrini er ikki bert veitingin, men eisini foreldragjaldið til ansing, ið foreldrini ikki skulu rinda.

Uppskotið hevur støði í, at tað eru pengarnir, sum fylgja barninum. V.ø.o., at tær útreiðslur, sum kommunan hevur av at ansa barninum, í staðin verður veittur til foreldur, sum velja at vera heima hjá barninum. Veitingin er sostatt ikki at rokna sum løn, og tí er veitingin ikki skattskyldug. Um veitingin hinvegin hevði verið skattskyldug, tá hevði partur av veitingini farið aftur til ávikavist land og kommunur sum skattur og tí ikki í tráð við omanfyrinevndu meginreglu. Neyðugt verður tí at broyta skattalógina samstundis, soleiðis at veitingin sambært hesi løgtingslóg verður undantikin skattskyldu.

Fyri at tryggja framhaldandi inngjald til eftirlønina hjá foreldrum, ið velja hesa skipan, skulu broytingar gerast í løgtingslóg um eftirløn fyri at staðfesta, at eftirløn skal rindast av veitingini.

Høvuðsendamálið við uppskotinum er, at geva foreldrum møguleika til í størri mun at vera saman við barni sínum fyrstu árini. Tí er tað ikki sameiniligt at móttaka veitingina og samstundis vera virkin á arbeiðsmarknaðinum. Tað er ásett, at tann, ið fær veitingina, ikki í størri mun átekur sær annað arbeiði. Tað er heldur ikki sameiniligt at móttaka veitingina og samstundis móttaka uppihaldsveiting og stuðul frá tí almenna. Veitingin kann sostatt ikki leggjast aftrat t.d. arbeiðsloysisstuðli, pensjón ella aðrari uppihaldsveiting. Hetta er ein meginregla, sum t.d. er vanlig í almannalóggávu.

Landsstýrismaðurin metir, at tað eru fleiri fyrimunir við uppskotinum. Eitt nú fer uppskotið at gera tað møguligt hjá fleiri foreldrum at velja, at ansa egnum børnum heima eitt sindur longri, enn bert í barsilsfarloyvistíðarskeiðnum, heldur enn at lata tey fara á stovn. At foreldur fáa meira tíð saman við sínum børnum og betri møguleikar at ansa teimum, metir landsstýrismaðurin verður ein fyrimunur fyri bæði børn og foreldur.

Harafturat kann hetta vera eitt amboð hjá kommununum betri at kunna skipa barnaansing.

Av vansum kann nevnast, at við tað, at tað við uppskotinum verður fíggjarliga lagaligari at ansa egnum børnum heima, kemur tað at hava við sær, at tey, sum velja at fara heim at ansa egnum børnum, ikki kunnu vera á arbeiðsmarknaðinum tað tíðarskeiðið.

Ein vansi við skattafríum veitingum er, at tær ikki telja við í inntøkugrundarlagnum fyri útrokning av barsilsgjaldinum og útgjaldi frá Arbeiðsloysisskipanini.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið er sent beinleiðis til ummælis hjá: Føroya Kommunufelag, Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum, Samtak, Samverk, Føroya Pedagogfelag, Føroya Lærarafelag, Fakfelagssamstarvinum, Barsilsskipanini, Arbeiðsloysisskipanini, Studni, Almannaverkinum, Vinnuhúsinum, Gigni, Fíggjarmálaráðnum, (TAKS), Uttanríkis – og Mentamálaráðnum, og Umhvørvis- og Vinnumálaráðnum, sum umsitur kommunumál.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Av tí at hetta er ein sjálvboðin kommunal skipan, hevur uppskotið í sjálvum sær ongar fíggjarliga avleiðingar við sær, hvørki fyri land ella kommunu.

Fyri tær kommunur, ið velja at brúka heimildina, kemur hetta at hava við sær fíggjarligar avleiðingar. Av tí, at tað vera kommunurnar hvør sær, sum koma áseta upphæddina, koma kommunurnar eisini at hava eitt fíggjarligt rásarúm, at avgera fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum, um tær velja at brúka møguleikan. Harafturat fara kommunur, sum seta skipanina í verk, at spara í rakstrarútreiðslum av kommunalari ansing. Tískil ber ikki til, at siga neyvari um fíggjarligu avleiðingarnar.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri landi. Um kommunur velja at brúka heimildina, fær hetta umsitingarligar avleiðingar fyri kommununa, ið skal umsita skipanina.

Tað verða eisini kommunurnar, ið skulu hava eftirlit við skipanini. Tí kemur uppskotið at hava við sær størri byrður á tær kommunalu umsitingarnar, sum velja at brúka heimildina í lógini.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Lógaruppskotið hevur ongar beinleiðis fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

Mett verður heldur ikki, at uppskotið kemur at hava stórvegis óbeinleiðis avleiðingar fyri vinnuna. Av møguligum óbeinleiðis avleiðingum kann nevnast, at uppskotið kann lætta um trýstið á ansingarstovnar í kommunum, ið velja at seta skipanina í gildi.

Tíðarskeiðið, tá foreldur brúka skipanina, eru tey sum meginregla ikki á arbeiðsmarknaðinum. Hetta merkir, at tíðin á arbeiðsmarknaðinum verður tað styttri fyri tey foreldrini og kann sigast, at útboðið av arbeiðsmegi verður tí skert tilsvarandi. Mett verður tó ikki, at hetta kemur at hava stórvegis ávirkan á vinnuna, eftirsum talan er um eina avmarkaða skipan, sum allarhelst ikki allar kommunur fara at seta í gildi.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Mett verður ikki, at uppskotið kemur at hava nakrar beinleiðis avleiðingarnar á umhvørvið. Einasta óbeinleiðis avleiðingin kann vera, at tey foreldur sum koma undir skipanina, fara at brúka bilin minni, bæði tí tey sjálvi ikki skulu til arbeiðis og tí tey ikki skulu koyra børnini aftur og fram.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Til ber ikki við hesum uppskotinum at siga, at lógaruppskotið kemur at hava nakrar serligar fíggjarligar, ella umsitingarligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

Lógaruppskotið hevur heldur ongar umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Tað eru eingir viðkomandi millumtjóðasáttmálar á økinum, sum hava við hetta lógaruppskotið at gera.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Tað eru eingir viðkomandi millumtjóða tvørgangandi sáttmálarnar á økinum.

**2.9. Markaforðingar**
Tað eru ongar kendar markaforðingar eru á økinum.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Veitingin skal ikki skattast, tí má broyting gerast í § 3 í skattalógini.

**2.12. Gjøld**
Ikki viðkomandi fyri hetta lógaruppskotið.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Ikki viðkomandi fyri hetta lógaruppskotið.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Innanfyri greiðar avmarkingar, fáa kommunurnar heimild at veita foreldrum eina veiting, um tey velja at ansa egnum børnum heldur enn at børnini fara á stovn.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Ikki viðkomandi fyri hetta uppskotið.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Neyðugt verður at broyta skattalógina, tí hetta skal vera ein skattafrí veiting. Harafturat verður neyðugt at broyta eftirlønarlógina fyri at staðfesta, at eftirløn skal rindast av veitingini.

## 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Ja | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Ja | Ja | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### Til § 1

**6 b, stk. 1**
Sum nýggj grein, eftir 6 a, verður grein 6 b sett inn.

§ 6 b, stk. 1 inniheldur høvuðsendamálið við løgtingslógarbroytingini. Endamálið og ásetingin hevur sín uppruna í samgonguskjalinum frá 2019, millum Fólkaflokkin, Sambandsflokkin og Miðflokkin.

Sum ásett, so fáa kommunur við hesi heimild, møguleikan at velja, at bjóða foreldrum við børnum upp til barnagarðsaldur eina veiting, um børn teirra ikki fara á dagstovn ella í dagrøkt sambært § 3 í dagstovnalógini.

Hetta er ein heimild sum kommunurnar fáa, og ikki ein skylda sum verður áløgd kommununum. Skipanin kann tí hóskandi lýsast, sum ein sjálvboðin skipan, har tað verður lati upp til ymisku kommunurnar at taka støðu til, um tær ynskja at bjóða sínum borgarum henda møguleika.

Hóast tað er eyðsýnt, at foreldur í sjálvum sær eru egnaði at ansa og æla síni egnu børn, kann tað vera eina ávísur sosialur váði fyri børnini og samfelagið, um børnini ikki koma í samband við onnur børn, ella bert koma í samband við børn í avmarkaðan mun. Hetta kann hava við sær, at børnini ikki mennast nøktandi sosialt ella málsliga. Við hesum í huga, er skipanin bert galdandi fyri børn upp til barnagarðsaldur.

**6 b, stk. 2**
Stk. 2 inniheldur ásetingar um avmarkingar fyri at fáa veitingina.

Meginreglan er, at foreldur, ið ætla sær at koma undir hesa skipan skulu fáa betri fíggjarligt rásarúm, at velja at fara av arbeiðsmarknaðinum í eitt styttri tíðarskeið, fyri at ansa egnum børnum upp til barnagarðsaldur. Tað er ikki ætlanin, at skipanin skal koma afturat øðrum almennum veitingarskipanum.

Avmarkingin í punkt 1 ásetur tí, at tað skal ikki bera til at móttaka:

- Arbeiðsloysisstuðul sambært løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 177 frá 17 desember 2020
- Útgjald frá barsilsskipanini sambært løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 174 frá 21. desember 2021.
- Veiting sambært løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021
- Uppihaldsveiting sambært løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021,
- Lestrarstuðul sambært løgtingslóg nr. 36 frá 3. mai 2007 um lestrarstuðul, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, ella

- Uppihaldsveiting ella lønarískoyti sambært løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10 desember 2021.

Avmarkingin í punkt 1 fevnir tó ikki um:

- Familjuískoyti sambært løgtingslóg nr. 160 frá 24. desember 2015 um familjuískoyti, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, og
- Ískoyti til stakan uppihaldara barnagjald til einsamallar uppihaldarar sambært løgtingslóg nr. 71 frá 20. mai 1996 um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021.

Við uppihaldsveiting sambært løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10 desember 2021, (almannalógin) er at skilja veiting sambært § 11, 13 og 25.

Punkt 1 tilskilar eisini, at heldur ikki ber til at fáa arbeiðsloysisstuðul, barsilspengar ella lestrarstuðil, samstundis, sum foreldur fáa frá hesi skipan. At tað ikki skal kunna bera til at fáa barsilspengar samstundis er, tí henda skipan ikki er ætla sum ein eyka fíggjarligur stuðul til foreldur, ímeðan tey eru í barsil.

Upplýsandi kann leggjast afturat, at fyri at fáa arbeiðsloysisstuðul, skal ein persónur sambært § 14 løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing vera tøkur á arbeiðsmarknaðinum. Mett verður ikki, at ein persónur sum kemur undir hesa skipan, og fær hesa veiting, hevði verið mettur tøkur sambært løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing.

Í høvuðsheitum er skipanin ætla at skulu virka eftir at barsilsstíðarskeiðið er liðugt.
Sum ásett í punkt 2, skal tað heldur ikki bera til, at hava nakað, ið ber brá av einum fulltíðar starvið samstundis. Endamálið er tað sama, at foreldur fáa betri fíggjarlig kor at vera um síni egnu bøn heima, uttan at tey skulu vera upptikin av øðrum. Tó er tað ikki soleiðis, at foreldur einki arbeiði kunnu gera samstundis. Eitt nú kann hugsast, at foreldur sita í nevnd, arbeiða hjá sjálvbodnum felag, ítróttarfelag ella hava onkra smærri uppgávu, ið tey kunnu loysa, tá børnini ikki krevja at foreldrini eru um tey á sama hátt, ella tá makin ella onnur eru um barnið. Einki mark er sett fyri hvussu nógv foreldrini kunnu arbeiða. Tað verða kommunurnar, ið skulu meta um, í hvussu stóran mun til ber at arbeiða og samstundis fáa frá hesi skipan.

Harafturat er tað í punkt 3 ásett, at foreldur og barn skal búgva á somu adressu. Mett verður ikki, at tað er í samsvar við endamálið við lógaruppskotinum, um foreldur og barn ikki búgva á somu adressu.

Eftirsum tað vera kommunurnar hvør sær, ið koma at umsita og hava eftirlit við ásetingunum, vera tað eisini kommunurnar hvør sær, sum mugu taka støðu til hvussu tær skipa eftirlitið.

**6 b, stk. 3**
Bæði foreldrini kunnu ikki koma undir skipanina og fáa veitingina fyri sama barnið samstundis. Hetta merkir tó ikki, at bæði foreldrini ikki kunnu koma undir skipanina samstundis, um tey talan er um tvey ymisk børn.

**6 b, stk. 4**
Sambært stk. 4 verður tað tann einstaka kommunan, ið skal áseta upphæddina. Til ber at siga, at í teimum førum, tá børnini ikki vera ansa á stovni, sparir kommunan útreiðslur, og tí er markið á veitingin tengt at ítøkiliga kostnaðinum fyri ansingini í kommununi.

Tá tað í Dagstovnalógini er ásett, at foreldragjaldið fyri stovnspláss í mesta lagi kann vera 30%, av tí tað kostar í rakstri, at hava eitt barn á stovni, er avgjørt at veitingin í mesta lagi kann vera 70% av miðal rakstrarútreiðslunum av at hava eitt barn á stovni.

Kommunufelagið hevur upplýst, at miðalkostnaður fyri ansing á vøggustovu kring landi í 2022 er 160.000,-. Veitingin hevði tí í 2022 í mesta lagi kunnað verið 70% av kr. 160.000,-. Tað er ein árlig skattafrí veiting á kr. 112.000,- ella kr. 9.333,33 um mánaðin. Harafturat skulu foreldrini ikki at rinda foreldragjaldið.

Sum ásett, so kunnu kommunurnar áseta eitt lægri gjald.

**Til § 2**
Ígildiskomuásetingin um, at henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir hon er lýst.

Almannamálaráðið, 8. november 2022.

**Sólvit E Nolsøe**
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen